

# Starvsfólk ella lærlingur til avgreiðsluna/støðina

Søkt verður eftir skrivstovufólki ella lærlingi til avgreiðsluna/støðina hjá Atlantic Airways á flogvøllinum

Arbeiði fevnir m.a. um:
- avgreiðslu av ferðafólki
- avgreiðslu av flogførum
- telefonavgreiðslu
- avgreiðslu av ferðaseðlum

Krøv
Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin (skrivstovufólkið) hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi. Lærlingur skal hava HH ella líknandi prógv.

- dugir at arbeiða við teldu
- hevur evni at samarbeiða og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- hevur hug til at arbeiða skiftandi tíðir
- kann arbeiða undir trýsti

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. august 2005. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Egin Simonsen á tlf. 34 10 22, 34 10 50 ella e-mail: egin@atlantic.fo.

Umsókn skal sendast til Atlantic Airways, Vága floghavn, 380 Sørvágur.

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka við heimstaði í Sørvági. Umleið 140 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, og árligi umsetningurin var 234 milliónir krónur í 2004. Atlantic Airways hevur fýra flogfør og tvær tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Íslandi og Noregi. Virksemið veksur í øðrum londum, og umleið ein triðingur av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrlurnar røkja ferðasamband til útoyggjarnar, og bjargingartyrlan stendur á varðhaldi alt samdøgrið.

ATLANTIC AIRWAYS
www.flyfaroe.com

www.sansir.fo





# Eitt virðiligt starv

Kaupthing søkir eitt fólk til ráðgeving og kundarøkt innan fyri virðisbrævaøkið.

Tín uppgáva verður at røkja sambandið við okkara viðskiftafólk. Ein umráðandi partur av arbeiðnum er at leggja skilagóðar og lønandi ætlanir fyri teirra íløgur. Umframt at ráðgeva teimum, vit longu samstarva við, skalt tú eisini leita upp hugsandi viðskiftafólk. Vit stremba eftir varandi viðurskiftum við okkara viðskiftafólk, og tí er álit eitt lykilorð.

Til starvið krevst, at tú ert álitisvekjandi og megnar at skapa virðing um tín persón. Tú ert útvendur og samskiftir lættliga við øll. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt, tær dámar avbjóðingar, og tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti.

Tú hevur eina hóskandi hægri útbúgving og hevur stóran áhuga fyri íløgum í virðisbrøv. Góðar arbeiðsroyndir á økinum eru ein fyrimunur, men als eingin treyt. Enskt dugir tú væl, bæði í skrift og talu.

Vit kunnu bjóða tær eitt avbjóðandi starv á fakliga høgum stigi í einum dynamiskum felagi í støðugari menning. Tú kemur at upplíva ein góðan samstarvsanda í einum spennandi og mennandi umhvørvi, har altjóða møguleikarnir eru góðir.

Lønin verður eftir avtalu. Hevur tú annars okkurt at spyrja um, ert tú vælkomin at venda tær til Peter Holm, stjóra í Kaupthing í Føroyum.

Send eina umsókn innan 15. august til:

Kaupthing
Virðisbrævameklarafelag
Tinghúsvegur 14
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

Kaupthing er leiðandi innan fyri virðisbrævahandil og vinnuráðgeving í Føroyum. Felagið røktar ognir fyri virki, stovnar og privatar íleggjarar og er fyrsta virðisbrævameklarafelag í Føroyum. Kaupthing er millum 10 teir størstu bankarnar í Norðurlondum umframt deildir í London, New York, Genève og Luksemburg. 10 fólk starvast í Kaupthing í Føroyum.

KAUPTHING


W W W . S O S I A L U R I N . F O